# Regin ræðist ikki Skype

**Hóast risafyritøkan Skype eisini bjóðar seg fram sum veitari innan sms-boð, metir Regin Dalsgaard, nýggju skipanina Dicopeople.com vera so góða, at Skype ikki er nøkur forðing**

KT-VINNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Regin Dalsgaard, stjóri saman við Róa Magnussen, ið hevur staðið fyri at gera skipanina brúkaravinarliga*
*mynd: Jens Kr. Vang*

Dicopeople.com er nýggjasta og higartil størsta verkætlanin hjá fólkunum handan vælumtóktu Isuus fartelefonskipanina. Skipanin er í mun til gomlu Isuus skipanina net-basera. Hetta merkir, at skipanin kann brúkast á øllum teldum, kring allan heimin, uttan at nakað forrit skal leggjast á telduna. Skipanin hevur samband við fartelefon feløg kring allan heim, og tú kanst fyri 80 oyru pr. sms senda sms-boð kring allan heimin.

Regin Dalsgaard, stjóri greiddi á tíðindafundi í morgun frá nýggju skipanini, ið felagið hevur arbeitt við seinastu 7 mánaðirnar. Skipanin, ið sendir sms-boð, hevur fleiri hentar eginleikar, m.a. ber til at senda somu sms-boð til ein lista av fólki. Eisini ber til at velja nær boðini skulu sendast. Hetta er m.a. hent, tá áminningar skulu sendast út. Her vóru ein tannlæknar og sjúkrahús dømir, ið Regin nevndi.

Tað kostar nógvan pening, at fólk ikki møtir upp til avtalur, men við hesi skipanini ber til, longu tá avtalan verður skrásett, at biðja skipanina um at senda eina áminning tann dagin avtalan er.

Nýggja skipanin er sambært Regini Dalsgaard tann einasta av sínum slag, og hon leggur seg á ein sera stóran marknað. Hetta kann avloysa eitt nú telefonlistar á skúlum, og hevur longu gjørt tað á fleiri skúlum og kann vera boðberi á størri virkjum og fyritøkum.

Regin Dalsgarð greiddi frá, at tey hava gjørt nógv burturúr at fáa gjørt skipanina somikið brúkaravinarliga sum til ber. Her er Rói Magnussen settur sum marknaðarfólk hjá felagnum, og menningin av brúkaraflatuni hevur verið bæði tíðarkrevjandi og kostnaðarmikil. Men úrslitið er, at skipanin er vorðin sera brúkaravinarlig.

– Hetta er ein roynd hjá okkum, at fara frá nørdafyritøku til ein veruligan corporate veitara, sigur Regin

Skipanin er royndarkoyrd bæði í og uttan fyri Føroyar, við góðum úrslitum. Longu nú hevur skipanin yvir 100 brúkarar uttanlands.

Tey ætla, at brúka tíðindavirði til at selja skipanina og fara í næstum at rundferð til tíðindafólk uttanlands at greiða frá skipanini.

Størsti veitarin innan ip-telefoni Skype, er eisini farin undir at veita sms-boð, men hetta ræðist Regin ikki. Skipanin hjá Skype hevur nevniliga ongan kalendara, men eisini á øðrum økjum er hon aftan fyri Dicopeople.com.

– Skype er eingin forðing - Skipanin hjá okkum er t.d. netbasera, soleiðis, at tú ikki skalt leggja nakað forrit inn fyri at brúka hana. Hetta merkir eisini, at fyritøkur, ið av trygdarávum ikki loyva Skype-ferðslu, kunnu brúka okkara skipan. Vit hava eina so mikið góða skipan, at vit eru at meta sum ein stórveitari innan sms, sigur Regin.

Til ber at vitja dicopeople.com, har er eisini møguleiki at royna skipanina í 30 dagar.

VINNUMÁLARÁÐIÐ
KT-FYRISITINGIN

## Søkt verður eftir starvsfólkum til KT-skivuna

Vinnumálaráðið søkir eftir tveimum starvsfólkum til KT-skivuna hjá KT-fyrisitingini.

KT- fyrisitingin er ein deild í Vinnumálaráðnum, ið tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild.

KT-fyrisitingin útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Hetta undirstøðu kervið verður nevnt LandsNET, og er eitt rættiliga stórt kt-kervi við gott 500 brúkarum, og støðugt vaksandi.

**Starvið:**
Uppgávan hjá KT-skivuni er í høvuðsheitum at ráðgeva og vegleiða teldubrúkarum, tá hesir hava tørv á hjálp. Talan kann verða um ráðgeving og vegleiðing í nýtslu av felags nýtsluskipanunum og standardforritum ella meiri tekniskari hjálp.

**Arbeiðsuppgávur**
- taka ímóti og skráseta fyrispurningar frá brúkarum
- um gjørligt, at hjálpa brúkaranum við trupulleikum
- senda fyrispurningar víðari til serkøn innan KT
- tryggja, at brúkari fær hjálp
- brúkaraumsiting

Talan er um ein nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann, sum settur verður, tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:
- Kunnleika og royndir innan KT
- Royndir við teimum vanligastu KT-forritunum (MS Office og øðrum)
- Hegni til at vegleiða brúkarum í nýtsluni av KT
- Viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan KT
- Ídni, áræði og góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har ið tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við starvsfólkini í landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur stjórnarráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2007. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Gunnar Toftegaard, tlf. 35 60 78.

HÚSAMEKLING
www.husamekling.fo
Keyp og søla av fastari ogn
tel 31 93 21



**Hvalsoyargøta 8, 100 Tórshavn**
**Stødd á húsum:** ...............52 m² x 2 + ovasta loft
**Stødd á grundøki:** ...........172 m²
**Byggiár:** ..........................1992
**Kostnaður:** ......................Hóskandi boð ynskist



**Íslandsvegur 39, 100 Tórshavn**
**Stødd á húsum:** ...............175 m² x 2
**Stødd á grundøki:** ...........350 m²
**Byggiár:** ..........................1966
**Kostnaður:** ......................Hóskandi boð ynskist



**Áarrás 9, 160 Argir**
**Stødd á húsum:** ..............77 m² x 2
**Stødd á grundøki:** ...........Uml. 300 m²
**Byggiár:** ..........................1989
**Kostnaður:** ......................Hóskandi boð ynskist




**Jákupstrøð 24, p 16, Velbastað**
**Stødd á húsum:** ..............
**Stødd á grundøki:** ...........uml. 544 m²
**Útsýni:** ............................Sera gott
**Kostnaður:** kr. 800.000 ella hægsta boð yvir



**Sjúrðagøta 2, 512 Norðagøta**
**Stødd á húsum:** ..............110 m² x 2
**Stødd á grundøki:** ...........588 m²
**Byggiár:** ..........................2006
**Kostnaður:** ......................Hóskandi boð ynskist



**Varðabú 34, 100 Tórshavn**
**Stødd á húsum:** ..............90 m² x 2 + loft 70 m²
**Stødd á grundøki:** ...........519 m²
**Byggiár:** ..........................1980
**Kostnaður:** ......................Hóskandi boð ynskist

VAGLIÐ · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 31 93 21 · FAX 31 93 31